

www.oljan.fo

**Jan Müller** 03 - 08 - 2012

# Mugu troyta Arktis við skynsemi

Tá amerikanski sendiharrrin, Laurie Fulton vitjaði í Føroyum herfyri var Arktis eisini á skránni. Serfrøðingabólkurin, sum løgmaður hevur sett at orða eina føroyska strategi um Føroyar í Arktis og Uttanlandsnevndin hjá løgtinginum høvdu høvi at hitta sendikvinnuna og seta henni spurningar. Oljan. fo tosaði við sendikvinnuna eftir fundin og setti henni spurningar - -Bæði Føroyar og USA hava áhuga fyri Arktiska økinum og vilja vera partur av menningini har. Vit síggja, at USA hevur givið loyvi til eitt nú Shell at bora eftir kolvetnum norðan fyri Alaska, hóast umhvørvisfelagsskapir mótmæla. Hvat er tín hugsan um hetta mál? Síðani Macondo vanlukkuna í Meksikanska flógvanum hava vit í USA verið sera varin og hugt at tøkniligu møguleikunum og avbjóðingunum í sambandi við oljuvirksemi á djúpum vatni serstakliga og eftirlitinum eisini. Hetta er nakað, sum Obama forseti raðfestir høgt. Um somu tíð roynir USA eisini at gerast minni heft at útlendskari orkuveiting, og tað krevur av okkum, at tað verða funnar nýggjar kolvetnisgoymslur, so eg haldi tað er í lagi at fara eftir enn ótroyttum kolvetnisgoymslum, eisini í Arktis soleingi hetta verður gjørt rætt og skynsamt og við tí rætta eftirlitinum. Grønland Grønland er partur av Arktis. Amerikanski sendiharrin sigur seg hava havt fundir við grønlendska landsstýrisformannin Kuubik Kleist um framtíðar olju- og mineralvánirnar í Grønlandi, og hon hevur álit á, at Grønland ger alt tað kann fyri, at oljuvirksemið er í tráð við reglur og eftirlit, sum eiga at vera fyri slíkum virksemi í Arktis. -Heimsins lond hava gjørt av at Suðurpólurin skal vera ogn hjá allari mannaættini og ikki brúkast til vinnulív endamál so sum oljuleiting. Tað eru tey, sum halda, at henda skipan átti eisini at verið galdandi fyri Arktis? Vit hava sæð, at londini í Arktis hava sett krøv fram um búskaparlig øki úti fyri teirra landaøkjum, og í dag eru tað tey 8 londini í Arktis, sum hava atgongd til hesi øki. Eg rokni ikki við, at tað fer at broyast í okkara livitíð. Kina -

Vit hava sæð, at Kina hevur gjørt stórar íløgur í eitt nú Afrika fyri at fáa atgongd til olju og gass har. Nù hoyra vit, at kinesarar eisini vilja gera íløgur í eitt nú Grønlandi fyri at fáa atgongd til rávørur har? Kina hevur eitt sera stórt íbúgvaratal, sum veksur, og hevur Kina tí tørv á at finna fram til, hvussu tað kann føða sítt fólk á teimum ymsu økjunum. Vit vita øll, at Kina tí roynir at fáa atgongd til náttúrutilffeingi kring allan heimin. Og tað er sjálvandi einki galið við tí. Men eg vóni bara, at tey lond, sum loyva øðrum framat náttúrutilfeinginum í egnum landi, eru so mikið væl fyri í allar mátar, at tey megna at hava eftirlit við útviklinginum. -Ein amerikanskur vitanarstovnur segði herfyri, at Grønland verður sjálvstøðugt um fá ár, og tá fer landið at nærkast USA. Grønland er ein av okkara næstu grannum. Vit síggja fram til at víðka um samstarvið við Grønland uttan mun til, um olja og gass verður funnið ella um landið verður sjálvstøðug tjóð. Mynd Sendikvinnan her á fundi við løgtingsins uttanlandsnevnd og umboð fyri serfrøðingabólk um Føroyar i Arktis og embætisfólk frá løgmans/uttanríkistænastuni. Mynd oljan.fo/Jan Müller